# Strategi fyri Sjúkrahúsverkið

Eitt sameint sjúkrahúsverk
á altjóða stigi,
eyðkent fyri nýhugsan

SJÚKRAHÚS
VERKIÐ

# Fororð

Føroyska sjúkrahúsverkið hevur verið í stórari menning seinastu árini, og fyri framman standa nógvar stórar avbjóðingar, sum sjúkrahúsini og heilsuverkið sum heild skulu kunna lofta. Samfelagsliga eru trý meginrák, sum longu í dag hava stóra ávirkan á okkara gerandisdag, og sum vit frameftir fara at merkja enn meira til. Tey trý meginrákini eru demografiska gongdin við fleiri eldri og fleiri við varandi sjúkum; tann stóra tøkniliga menningin, sum hevur við sær fleiri viðgerðarmøguleikar og møguleika fyri viðgerð í longri tíð; og ein støðugt øktur eftirspurningur eftir heilsutænastum millum fólk, sum hava nýggjar og størri væntanir til hvørjar heilsutænastur tað almenna heilsuverkið veitir.

Vit meta sjálvi, at vit eru væl brynjaði. Vit hava fyrst og fremst ein góðan hóp av hugaðum og vælútbúnum starvsfólkum. Seinnu árini eru fleiri nýggir serlæknar komnir til, og útboðið av tænastum á øllum trimum sjúkrahúsunum er økt samsvarandi nógv. Tað sæst aftur í virksemishagtølunum, sum vísa ein vøkstur á 7 prosent í miðal seinastu fimm árini undan koronu. Komandi ár verður nýggjur sjúkrahúsbygningur tikin í nýtslu á Landssjúkrahúsinum. Flytingin hevur ikki einans fleiri sjúkrahúsfermetrar við sær, men markerar eitt týðandi lop inn í samtíðina, tá tað kemur til umstøður hjá sjúklingum og starvsfólki.

Organisatoriskt eru vit somuleiðis væl fyri at taka ímóti avbjóðingunum. Umskipanirnar í sjúkrahúsverkinum geva eitt gott grundarlag fyri, at tey trý sjúkrahúsini koma at virka sum ein samskipað, samstarvandi og effektiv eind. Hetta er tað, ið vit sum leiðsla í Sjúkrahúsverkinum settu allarfremst á breddan, tá vit tóku við fyri skjótt tveimum árum síðani, og sum í nýggju visjónini er orðað sum "Eitt sameint sjúkrahúsverk á altjóða stigi eyðkent fyri nýhugsan". Nøkur ítøkilig úrslit um sameining eru longu at síggja á sjúkrahúsunum, og fleiri átøk eru á trappuni, sum peika sama veg, men fyri okkum byrjar tann skipaða sameiningin av álvara nú.

Sigast kann, at vit í arbeiðinum við virðisgrundarlagnum hava lagt lunnar undir strategisku málini, sum verða løgd fram alment í hesum skjali. Í sjálvum sær hava felags visjón, missión og virðir ikki ávirkan á tænastustøðið á teimum trimum sjúkrahúsunum, men við virðisgrundarlagnum hava vit sett eitt greitt felags mál og eitt mið, sum vit kunnu seta kósina eftir.

Sjúkrahúsleiðslan hevur sett út í kortið eina røð av ítøkiligum ætlanum, sum komandi árini fara at flyta Sjúkrahúsverkið frá at vera tríggjar sjálvstøðugar eindir, til at virka sum ein eind, sum er samanhangandi, sum samvirkar og samstarvar á øllum stigum og í øllum lutum.

Talan er um í alt 43 strategisk mál, skipaði undir fimm strategiskum sporum, sum skulu vera við til at røkka visjónini um eitt sameint sjúkrahúsverk á altjóða stigi, eyðkent fyri nýhugsan. Tey fimm sporini eru:

→ Okkara samleiki

→ Viðgerð við høgari dygd og sjúklingatrygd

→ Starvsfólkamenning og trivnaður

→ KT, medico og heilsuskipanir

→ Strategisk menning

Tað verður okkara uppgáva sum leiðsla at fáa mongu málini at eydnast, men uttan tey mongu starvsfólkini á sjúkrahúsunum megna vit sum leiðsla lítið. Vónandi kunnu vit í felag flyta okkara sjúkrahúsverk longur fram á leið.



**Steinar Eirikstoft,**
forstjóri

# Innihald


**Fororð** 3

**Kapittul 1**
**Samandráttur og tíðarætlan** 7

**Kapittul 2**
**Soleiðis er strategiin ment** 10

**Kapittul 3**
**Felags virðisgrundarlag fyri Sjúkrahúsverkið** 13
Vision 2025 13
Missión 13
Virðini 13

**Kapittul 4**
**Strategisku málini** 16
Okkara samleiki 16
Viðgerð við høgari dygd og sjúklingatrygd 16
Starvsfólkamenning og trivnaður 16
KT, medico og heilsuskipanir 16
Strategisk menning 16

**Okkara samleiki** 16
1. Felags virðisgrundarlag 16
2. Felags intranet 16
3. Felags heimasíða 16
4. Felags politikkir fyri Sjúkrahúsverkið 16
5. Felags innleiðsla 17

**Viðgerð við høgari dygd og sjúklingatrygd** 17
6. Felags mannagongdir 17
7. Felags visitatión 17
8. Urologi felagsvisitatión 17
9. Optimering av samlaða skurðkapasitetinum 17
10. Sameina medisinska økið 17
11. Tvørfaklig og tvørgangandi rehabilitering í Sjúkrahúsverkinum 17
12. Neurorehabilitering 19
13. Parkinson rehabilitering 19
14. Demensvinarligt samfelag 19
15. Uppraðfesta ADHD viðgerðartilboðið 19
16. Útgangandi funktiónir til sjúklingar 19
17. Ætlan fyri telemedisinskar loysnir 19
18. Útbúgving og gransking 19

**Starvsfólkamenning og trivnaður** **20**
19. Strategi fyri rekruttering og fasthaldan 20
20. Strategi fyri starvsfólkamenning 20
21. Trivnaðarkanningar og sálarligt arbeiðsumhvørvi 20
22. Starvsfólkaumbýti – innan- og uttanfyri Sjúkrahúsverkið 20
23. Mannagongdir, tá starvsfólk byrja í og fara úr starvi 20
24. Leiðsla og leiðslumenning 20

**KT, medico og heilsuskipanir** **20**
25. Talgildu Føroyar 20
26. Heilsunet í øllum Sjúkrahúsverkinum 21
27. Dygdarskipan og sporing av sterilum amboðum 21
28. Bíðilistar og hagtøl 21
29. Uppstiging COSMIC 8.1. 21
30. Nýggj talgild heilsuskipan 21
31. Pre-hospital journalskipan 21
32. Tryggja sjúklingadátur til uttanhýsis viðgerðarstovnar 21
33. Sjúklinga app 22

**Strategisk menning** **22**
34. Heildarætlan og støðulýsing av øllum bygningunum hjá Sjúkrahúsverkinum 22
35. Nýggjan fyrisitingarbygning á Klaksvíkar Sjúkrahúsi 22
36. H-bygningurin tikin í nýtslu 22
37. Dagføra akuttilbúgvingarnar 22
38. Dagføra Sjúkraflutningstænastuna 22
39. Strategisk dimensioneringsætlan 22
40. Ætlan fyri kliniska staðseting í Sjúkrahúsverkinum 24
41. Familjudepilin 24
42. Steno Diabetes Center Færøerne 24
43. Raðfesta tilmælini í nýggjari Krabbameinsætlan 24

**Kapittul 5**
**Íverksetan og eftirmeting** **26**
Leypandi eftirmeting 26

# KAPITTUL 1

# Samandráttur og tíðarætlan

Tað var í 2018, at táverandi landsstýriskvinna legði fram fyri Løgtinginum ætlanina um at sameina sjúkrahúsverkið, við tí endamáli at fáa tey trý sjúkrahúsini at virka sum eina sterka eind. Ætlanirnar bygdu á tilmælini í Menningarætlanini fyri sjúkrahúsverkið, sum ein breitt umboðandi arbeiðsbólkur hevði handað landsstýrinum árið fyri.

Eftir eina góða politiska nevndarviðgerð og gevandi orðaskiftið varð farið víðari við arbeiðinum, og ein yvirskipað leiðsla fyri sjukrahúsverkið varð skipað.

Ein av høvuðsuppgávum hjá leiðsluni er at fáa sameint og samskipað virksemið á teimum trimum sjúkrahúsunum til frama fyri sjúklingadygd og -trygd. Sett er út í kortið, at leiðslan hevur til uppgávu at optimera samlaða virksemið í sjúkrahúsverkinum, at tryggja at tilfeingið (fíggjarliga tilfeingið, starvsfólk, hølir og útbúnaður) verður gagnnýtt so rationelt sum gjørligt. Samstundis skal leiðslutoymið í samráð við Heilsumálaráðið skipa eitt greitt uppgávubýti, sum bæði fakliga og rakstrarliga er skynsamt.

Tað er við støði í hesum, at leiðslurnar á teimum trimum sjúkrahúsunum saman við øðrum hava ment eina yvirskipaða strategi, sum fram móti 2025 skal sameina Sjúkrahúsverkið. Tilgondin hevur verið umfatandi og neyðuga drúgv, so málini kundu rótfestast væl í organisatiónini, tí fleiri av strategisku málunum kunnu fáa stóra ávirkan á gerandisdagin hjá nógvum starvsfólkum.

Talan er um tilsamans 43 strategisk mál, sum eru skipaði í fimm spor. Á myndini niðanfyri eru øll 43 sett inn í eina matrisu. Sum vera man kunnu øll ikki gjøgnumførast í senn, og myndin vísir, nær ætlanin er at fremja ymsu málini. Vit tora at siga longu nú, at hendan tíðarætlan fer ikki at halda. Sjúkrahúsverkið er ein livandi organisatión, sum má tillaga seg til samtíðina og tann tørv og krøv, sum samfelagið setur. Tað merkir, at vit við vissu koma at arbeiða við øðrum átrokandi málum hesi komandi fýra árini, sum vit ikki duga at spáa um í dag. Samstundis er tað sera sannlíkt, at nøkur mál, sum kanska liggja seinni í tíðarætlanini, brádliga gerast meira aktuell ella lata seg loysa fyrr og skjótari enn væntað. Tí fara vit javnan at dagføra tíðarætlanina.

Hvørt tal á myndini sipar til eitt strategiskt mál, sum eru nærri lýst í kapittul 4. Sum myndin vísir, so eru nøkur strategisk mál longu avrikað. Tey síggjast við grønum liti í myndini.

## → Strategisk mál fram móti Vision 2025



Tey strategisku sporini eru sum nevnt fimm í tali, og tey eru:

- Okkara samleiki
- Viðgerð við høgari dygd og sjúklingatrygd
- Starvsfólkamenning og trivnaður
- KT, medico og heilsuskipanir
- Strategisk menning

Ymiskt er, hvønn uppruna tey strategisku málini hava. Tey flestu málini hava leiðslurnar í sjúkrahúsverkinum sjálvi sett á skrá, nøkur sóu dagsins ljós í Menningarætlanini fyri sjúkrahúsverkið frá 2016, og aftur onnur spretta úr nýggjum politiskum raðfestingum hjá landsstýrismanninum í heilsumálum.

Uttan mun til uppruna, hava øll tey strategisku málini tað í felag, at tey peika ímóti visjónini fyri 2025, sum er, at vit skulu hava eitt sameint sjúkrahúsverk á altjóða stigi, eyðkent fyri nýhugsan.

Tey 43 strategisku málini eru eisini ymisk í vavi. Nøkur teirra taka stutta tíð at seta í verk og krevja ikki stórvegis fyrireiking ella luttøku frá starvsfólkum fyri at eydnast. Onnur teirra eru hinvegin sera umfatandi, krevja gjølla fyrireiking og nógva starvsfólkaorku fyri at eydnast.

Tá talan er um broytingar, sum hava við sær stórar broytingar fyri nógv fólk, verður hetta gjørt stigvíst og skilvíst og við neyðugum rótfesti, so starvsfólkini ikki kenna seg tikin av fótum í tilgongdini.

Leiðslan í Sjúkrahúsverkinum hevur skipað eina eind innahýsis, við starvsfólkum frá øllum trimum sjúkrahúsunum við viðkomandi førleikum, at stuðla undir verksetingina av teimum strategisku málunum.



# KAPITTUL **2**

# Soleiðis er strategiin ment

Tað er leiðslan í Sjúkrahúsverkinum, ið hevur ment nýggju strategiina, sum røkkur fram til 2025. Leiðslan er mannað av einum forstjóra, tveimum stjórum og fýra varastjórum. Eitt útkast til strategi var í tilgongdini lagt fram á stórfundi, har allir depilsleiðarar og flestu yvirlæknar í Sjúkrahúsverkinum høvdu møguleika at luttaka, umrøða og gera viðmerkingar til útkastið, áðrenn síðsta hond varð løgd á strategiina.

Fyrst og fremst tekur stategiin støði í tilverugrundarlagnum hjá Sjúkrahúsverkinum, t.e. orðaðu missiónini. Á myndini niðanfyri er tað ásin, sum liggur vatnrøtt. Harnæst hevur leiðslan sett kósina fram móti 2025 við at orða eina visjón. Visjónin er málið, ið vit seta kósina eftir. Hon verður ikki rokkin beinanvegin, men við miðvísum og stigvísum arbeiði væntar sjúkrahúsleiðslan, at vit eru komin at visjónini í 2025.

Virðini, sum starvsfólk og leiðsla hava funnið fram til í felag, lýsa nakrar eginleikar, sum vit knýta til okkara dagliga virki, og sum vit ynskja í enn størri mun fara at síggjast aftur í atferðini hjá starvsfólkum okkara frameftir.

## → Visión 2025

Eitt sameint sjúkrahúsverk á altjóða stigi, eyðkent fyri nýhugsan.




Orðingarnar í virðisgrundarlagnum eru meira og minni abstraktar. Fyri at røkka visjónini er eisini neyðugt at seta sær heilt ítøkilig mál, sum eru málbar. Ein grundregla fyri einari strategi er, at góð javnvág er millum tilval og frával, tí annars missur strategiin fokus.

Fyri at geva strategiini fokus hevur sjúkrahúsleiðslan sett fram fimm strategisk spor, sum øll flyta okkum fram ímóti visjónini, samstundis sum tey taka støði í visjónsorðingini. Innanfyri hvørt spor eru fleiri ítøkilig strategisk mál.

Myndin niðanfyri vísir, hvussu strategisku málini og visjón, missión og virðini hanga saman. Sum nevnt eru strategisku málini bæði ein ítøkiligerð av øllum virðisgrundarlagnum, og samstundis eru tey ein treyt fyri, at Sjúkrahúsverkið røkkur visjónini um ein sameint sjúkrahúsverk á altjóða stigi, eyðkent fyri nýhugsan.

Til ber at síggja gongdina fyri sær, har Sjúkrahúsverkið trappustig fyri trappustig nærkast visjónini, so hvørt strategisku málini eydnast.

## Visión 2025

Eitt sameint sjúkrahúsverk á altjóða stigi, eyðkent fyri nýhugsan.




Strategimenningartilgongdin er lýst á myndini niðanfyri. Tilgongdin verður tann, at so hvørt sjúkrahúsleiðslan kunnger og lýsir tey strategisku málini á einum yvirskipaðum støði, er tað leikluturin hjá øðrum leiðarum og starvsfólkum at arbeiða víðari við málunum, at gera ítøkiligar virkisætlanir við deilmálum, og at gera ætlan fyri, hvussu málini verða sett í verk.

## Strategimenning og íverkseting

Top-Down & Bottom-Up



# KAPITTUL 3

# Felags virðisgrundarlag fyri Sjúkrahúsverkið

Í februar í 2020 setti yvirskipaða leiðslan í Sjúkrahúsverkinum út í kortið, at samlaða sjúkrahúsverkið skuldi hava eitt felags virðisgrundarlag.

Tá vit tosa um eina nýggja visjón, missión og virði, so snýr hetta seg um, at vit sum sjúkrahúsverk hava allýst okkara kjarnuuppgávu, sum er missiónin. Tað er tað vit gera, og sum er okkara tilverurættur. Men umframt hetta hava vit eitt ynski og eitt mál fyri, hvar vit skulu vera komin í 2025. Hetta er málið, ið vit vilja røkka og hagar kósin verður sett. Hetta er okkara visjón.

Triðja beini í virðisgrundarlagnum var at finna fram nøkur virðir, sum skuldu verða sameinandi fyri øll starvsfólkini á teimum trimum sjúkrahúsunum. Virðini eru orð, sum á ein hátt eru fyridømir og skulu virka leiðbeinandi fyri atburðin hjá starvfólkunum í sjúkrahúsverkinum.

Avgerandi fyri tilgongdina var, at hesi virði skuldu skapast av starvsfólkunum í sjúkrahúsverkinum. Tí bleiv eitt lið – Virðisliðið – sett á stovn, har 26 umboð fyri tey trý sjúkrahúsini fingu sess, vald av lokalu samstarvsnevndunum. Í Virðisliðnum vóru eisini starvsfólk úr ymsu fakbólkunum og umboðaðu tí alt Sjúkrahúsverkið. Felags virðisgrundarlaðið hjá Sjúkrahúsverkinum er soljóðandi:

## Visión 2025

### Eitt sameint sjúkrahúsverk á altjóða stigi, eyðkent fyri nýhugsan

- Trý sjúkrahús, sum samskifta, virka og skapa eftir somu virðum.
- Felags mentan og sami samleiki tvørtur um sjúkrahúsini.
- Virðing fyri sjúklingum, avvarðandi og starvsfólki, so at góð hugskot birtast og hava gróðrarlíkindi fyri víðarimenning.
- Áhaldandi menning av starvsfólkum, stuðlað av nýggjastu tøkni.
- Rættstundis sjúkugreinan og viðgerð við skipaðum sjúklingagongdum.

## Missión

### Dygdargóð heilsutænasta alt lívið

- Sjúkrahúsverkið veitir heilsutænastur, ið fevna frá gitnaði til seinastu fráferð.
- Málið er dygdargóðar heilsutænastur, bornar av vitan og tænastusinni.

### Vitan

- Faklig vitan, førleikar og menning
- Tøkni í breiðastu merking
- Mentan, sum er opin og fevnandi

### Tænastusinni

- Uppliving av at vera í miðdeplinum
- Uppliving av góðari tænastu
- Uppliving av nærlagni

## Virðini

Virðini eru ***stev, áræði og flog.*** Undir teimum trimum virðunum eru nærri frágreiðingar, sum lýsa setningarnar og hugtøkini nærri. Tað hevur verið týdningarmikið, at fáa umsett virðisgrundarlagið til ítøkilig ynskir, um hvussu virðini kunnu síggjast aftur í atburðinum hjá okkum, tá ið vit eru til arbeiðis. Eitt dømi er virðið Stev, sum í atburði merkir, at tú í talu og verki sýnir sjúklingum og starvsfeløgum virðing, og at tú vísir toymisanda millum deildir, deplar og sjúkrahús.

Somuleiðis kann nevnast, at Áræði merkir í atburði, at tú birtir vón og vísir á gongdar leiðir, og tú tekur ábyrgd, tá avgerðir skulu takast. Eitt dømi um hvussu Flog kann síggjast aftur í atburði er, at tú setur høg mál og torir at bróta upp úr nýggjum, og tú ert móttøkubúgvin fyri broytingum.

## Stev

- At hava felags stev gevur styrki, sýnir samanhald og vekir álit.
- Fyri at halda felags stev, mugu vit arbeiða tvørtur um mørk, deildir og fakøki. Vit eru øll javnlík, tá uppgávur skulu loysast – og fyri at koma á mál krevur tað bæði samskipan, samskifti og eina neyva kós.
- Rúm skal vera fyri øllum, og vit skulu duga at gagnnýta styrkirnar hjá tí einstaka. Øll skulu kenna seg vird, og øll skulu kunna siga sína hugsan.

**Í atburði merkir hetta:**

- At tú í talu og verki sýnir sjúklingum og starvsfeløgum virðing.
- At tú setur teg inn í støðuna hjá tí, tú samstarvar við.
- At tú raðfestir felags mál hægri enn egin mál.
- At tú vísir toymisanda millum deildir, deplar og sjúkrahús.

## Áræði

- At hava áræði gevur drívmegi og skapar framburð.
- Fyri okkum er umráðandi at vera ágrýtin, sýna jaligan hugburð og vilja royna nýggjar leiðir. Vit skulu veita høga dygd og skjótleika.

**Í atburði merkir hetta:**

- At tú birtir vón og vísir á gongdar leiðir.
- At tú ert áhaldandi og vísir nærlagni.
- At tú eggjar til loysnir.
- At tú tekur ábyrgd, tá avgerðir skulu takast.

## Flog

- At hava flog merkir, at vit kunnu vera skapandi, hugsa víðskygt og navigera í broytingum, samstundis sum vit loysa okkara uppgávur.
- Flog er eitt fjøltáttað hugtak, sum krevur, at vit brúka okkara hugflog, eru forvitin, koma við góðum hugskotum, mennast og skapa yvirlit.
- Fyri at halda flognum krevst framfýsni. Til tess krevst føði – vitan og menning.

**Í atburði merkir hetta:**

- At tú setur høg mál og torir at bróta upp úr nýggjum.
- At tú býður vanahugsan av.
- At tú ert móttøkubúgvin fyri broytingum.
- At tú støðugt víðkar sjónarringin.

# KAPITTUL **4**

# Strategisku málini

Sjúkrahúsleiðslan hevur arbeitt við fimm strategiskum sporum og til tilsamans 43 strategiskum málum, sum verða ætlanin er at røkka áðrenn árslok í 2025. Tey fimm strategisku sporini eru lýst yvirskipað niðanfyri.

### Okkara samleiki

Okkara samleiki er sporið, har vit arbeiða við okkara samleika, um hvussu vit samskifta og samstarva, bæði millum sjúkrahús og deildir. Eisini er sjóneykan sett á, hvussu sjúklingar og borgarar síggja okkum sum eitt sjúkrahúsverk.

### Viðgerð við høgari dygd og sjúklingatrygd

Kjarnufunktiónin í einhvørjum sjúkrahúsi eru tær klinisku tænastur, ið veittar verða. Í hesum sporinum arbeiða vit við at menna okkara kliniska virksemi á einstøku sjúkrahúsunum og millum sjúkrahúsini.

### Starvsfólkamenning og trivnaður

Týdningarmiklasta tilfeingið í sjúkrahúsverkinum er uttan iva starvsfólkini. Eitt vælvirkandi sjúkrahúsverk hevur fakliga dugnalig starvsfólk og leiðarar, og setur trivnað og gott arbeiðsumhvørvi í hásæti.

### KT, medico og heilsuskipanir

Hetta er okkara tøknispor, har vit miðvíst arbeiða við at menna útvalda tøkni og tólbúnað, sum stuðla undir góðsku, dygd og sjúklingatrygd v.m.

### Strategisk menning

Tað er av alstórum týdningi, at vit arbeiða skipað, tá talan er um størri og umfatandi strategisk nýbrot innan eitt nú íløgur og skipanarligar broytingar (organisatiónsbroytingar), sum skulu flyta okkum nærri at visjónini.

## Strategisk mál

## Okkara samleiki

### 1. Felags virðisgrundarlag

Fyri at røkka málinum við einum samlaðum og sameindum sjúkrahúsverki, er neyðugt at hava eitt felags virðisgrundarlag og eina felags kós.

Málið er, at tey trý sjúkrahúsini samskifta, virka og skapa eftir somu virðum. Í virðunum lýsa vit hvønn atburð vit ynskja í Sjúkrahúsverkinum – hvussu ynskja vit t.d. at taka ímóti sjúklingum, hvussu samstarva og samskifta vit bæði innanhýsis og uttanhýsis. Nýggj visjón, missión og virðir fyri Sjúkrahúsverkið eru gjørd saman við starvsfólkunum og eru almannakunngjørd. Harafturat er ein sniðhondbók liðug, við millum annað einum nýggjum búmerki. Fyrireikandi arbeiðið er sostatt liðugt, og tað drúgva íverksetanararbeiðið er sett í gongd.

### 2. Felags intranet

Starvsfólkini í Sjúkrahúsverkinum skulu hava eina felags intranetloysn, sum skal virka sum eitt viðkomandi talgilt amboð við høgari dygd. Hetta kann gerast við at menna verandi intranetpall, Heimabeitið, ella við at finna aðra hóskandi loysn. Intranetið skal millum annað vera eitt felags innanhýsis amboð í Sjúkrahúsverkinum til kunning og samskifti, undir hesum at deila skjøl millum sjúkrahús, deildir og starvsfólk. Heimabeitið skal verða pallurin, har m.a. mannagongdir, starvsfólkapolitikkir, leiðreglur og instruksir verða løgt út, liggja og eru lætt atkomilig hjá øllum starvsfólkum. Eisini hava starvsfólkini sjálvi møguleika at miðla tíðindi á felags intranetinum.

### 3. Felags heimasíða

Sjúkrahúsverkið skal hava nýggja felags heimasíðu. Heimasíðan skal vera pallurin fyri samskifti við allar borgarar, sum hava tørv á sjúkrahúsviðgerð ella kanning, uttan mun til hvar borgarin er staddur landafrøðiliga. Viðgerðin til sjúklingin skal vera í miðdeplinum, og hetta skal sniðið á heimasíðuni avspegla. Kravfestingin er liðug, og heimasíðan er boðin út.

### 4. Felags politikkir fyri Sjúkrahúsverkið

Í sameinda Sjúkrahúsverkinum skulu øll starvsfólkini arbeiða eftir somu politikkum. Talan er um starvsfólkapolitikkir, trygdarpolitikkir o.a. Í dag hava tey trý sjúkrahúsini politikkir, men teir eru ikki eins. Fyri at røkka visjónini um eitt sameint sjúkrahúsverk er tað neyðugt at fáa politikkirnar endurskoðaðar, orðaðar og síðani íverksettar sum felags politikkir fyri øll starvsfólkini í Sjúkrahúsverkinum.

### 5. Felags innleiðsla

Endamálið við felags innleiðslu er at kunna nýggj starvsfólk yvirskipað um Sjúkrahúsverkið sum arbeiðspláss, soleiðis at tey fáa skjótt innlit í nógv av tí, sum verður gjørt her. Eitt grundleggjandi innlit í Sjúkrahúsverkið er týdningarmikið fyri starvsfólk, sum skjótt og trygt skulu kunna luttaka virkin í arbeiðsdegnum. Sjúkrahúsini hava innleiðsluna hvør sær, men hetta skal leggjast soleiðis tilrættis, at innleiðslan verður skipað á sama hátt á øllum trimum sjúkrahúsum við virðum, missión, visjón og strategi sum grundarsteinar.

## Viðgerð við høgari dygd og sjúklingatrygd

### 6. Felags mannagongdir

Sjúklingar skulu hava eina uppliving av Sjúkrahúsverkinum sum eina heild, og fáa somu dygdargóðu heilsutænastu, óansæð hvat sjúkrahús, hvønn depil ella hvørja deild sjúklingurin vitjar. Neyðugt er við einari felags dygdarskipan, so øll starvsfólkini kunnu kenna leiðreglur og mannagongdir, uttan mun til hvar í Sjúkrahúsverkinum tey starvast. Tað skal vera ein skipan, ið tryggjar dygdargóða viðgerð og røkt til eina og hvørja tíð.

Arbeiðast skal við at seta í verk eina hóskandi dygdarskipan fyri alt Sjúkrahúsverkið, og avgerandi í hesum arbeiði er at tryggja, at skipanin verður brúkt í gerandisdegnum.

### 7. Felags visitatión

Ein felags visitatiónsskipan fyri Sjúkrahúsverkið er ein fortreyt fyri, at virksemið og tilfeingið í Sjúkrahúsverkinum kann gangnýtast til fulnar. Ávísandi læknar hava tørv á at senda eina ávísing til eitt stað og ikki til trý sjúkrahús. Við einari inngongd og felags visitatión til ávísingar innan hvørja sergrein kann sleppast undan dupultávísingum. Harvið kann kapasiteturin gagnnýtast optimalt, og gjøgnumskygni verður í bíðitíðunum.

### 8. Urologi felagsvisitatión

Ein týðandi liður í at samskipa eina góða tænastu og stytta um bíðilistar er felags visitatión fyri tær sergreinar, sum arbeiða uppá tvørs av øllum Sjúkrahúsverkinum. Urologisk viðgerð verður framd á øllum trimum sjúkrahúsunum, og tískil er ein felags visitatión týdningarmikil. Tað er samstundis ein fyrimunur í samstarvinum við kommunulæknarnar, at teir hava eina inngongd til Sjúkrahúsverkið.

Felags visitatión innan urologi er sett í verk, hetta tryggjar, at sjúklingar við urologiskum sjúkum ikki verða visiteraðir til fleiri sjúkrahús. Ein visitator sendir sjúklingar til best hóskandi viðgerð og sjúkrahús. Næsta stig er at eftirmeta og víðarimenna skipanina.

### 9. Optimering av samlaða skurðkapasitetinum

Allar skurðlinjur og ambulatoriikapasitetur í Sjúkrahúsverkinum eigur at verða gagnnýttur optimalt, so sjúklingurin ikki bíðar óneyðugt eftir kanning og viðgerð.

Neyðugt er at neyvlýsa, hvør skurðkapasitetur og førleiki er á teimum trimum sjúkrahúsunum. Sama er galdandi fyri ambulatoriivirksemi. Virksemið eigur at verða planlagt samsvarandi hesum – hetta hongur tætt saman við eini felags visitatión innan skurðsergreinar.

### 10. Sameina medisinska økið

Í Sjúkrahúsverkinum skulu allir medisinskir sjúklingar í Føroyum fáa viðgerðartilboð á eins høgum støði uttan mun til landafrøði. Talið av medisinskum serlæknum er avmarkað, og ynskið er, at hesin serkunnleikin skal koma sjúklingunum á øllum trimum sjúkrahúsum til góðar. Harafturat er seingjarkapasiteturin í Sjúkrahúsverkinum avmarkaður, tí er týdningarmikið, at vit tryggja best møguliga gagnnýtslu av øllum medisinsku seingjarplássunum í landinum. Tað krevur samskipan, og at læknar – har tað letur seg gera – flyta ímillum tey trý sjúkrahúsini.

### 11. Tvørfaklig og tvørgangandi rehabilitering í Sjúkrahúsverkinum

Hóast stórir sjúklingabólkar, sum t.d. krabba-, gigt- og ryggsjúklingar, hava fingið eitt endurvenjingartilboð seinnu árini, er rehabiliteringin sum heild ein eftirbátur í Sjúkrahúsverkinum. Arbeitt verður við at menna enn fleiri tilboð innan rehabilitering og at samskipa hesi betri millum sjúkrahúsini. Harafturat eiga tvørgangandi funktiónir at verða mentar.

Í Menningarætlanini fyri sjúkrahúsverkið verður mælt til at stovnseta eina tvørgangandi sálarfrøðiliga eind fyri somatiska økið. Ein møguleiki er at skipa eitt toymi, har fleiri fakbólkar eru umboðaðir, við eitt nú heilsusálarfrøðingi, neurosálarfrøðingi og audiologopedi.



## 12. Neurorehabilitering

Tørvur er á at menna fleiri tilboð innan neurorehabilitering í Sjúkrahúsverkinum. Fleiri átøk eru gjørd seinastu tíðina, og neurologisk endurvenjing er í dag á øllum sjúkrahúsunum.

Næsta stig er at menna apopleksi- og sclerosuendurvenjingartilboðini á sjúkrahúsunum. Arbeiðið verður samskipað millum sjúkrahúsini, og greiðar mannagongdir um visitatión verða gjørdar. Tá apopleksi-endurvenjingartilboðið er skipað og íverksett, skal økið innan sclerosu kortleggjast, og endurvenjingartilboðið íverksetast tvørtur um sjúkrahúsini og viðgerðir uttanlands.

## 13. Parkinson rehabilitering

Menning av serkønari endurvenjing innan Sjúkrahúsverkið – ið er ein grundleggjandi fyritreyt fyri at fáa samanhangandi endurvenjingartænastu í Føroyum – hevur høga raðfesting og samsvarar við politiska viljan. Ein sjúklingabólkur ið hevur stóran tørv á serkønum endurvenjingartilboði, eru sjúklingar við Parkinson.

Endamálið við serkønari endurvenjing til persónar við Parkinson er at hjálpa sjúklingum til eitt sjálvstøðugt og innihaldsríkt lív og við tí betra um lívsgóðskuna. Tilboðið er nú ment og virkið á Suðuroyar sjúkrahúsi í samstarvi við Landssjúkrahúsið. Næsta stig er at eftirmeta og víðarimenna tilboðið og onnur tilboð innan neurorehabilitering.

## 14. Demensvinarligt samfelag

Sjúkrahúsverkið vil gera sítt fyri, at Føroyar gerast eitt demensvinarligt samfelag. Á Psykiatriska deplinum hevur verið arbeitt við at umleggja skipanina við landsdemenssamskiparunum, og av royndum verður hetta nú broytt til, at funktiónin sum landsdemenssamskipari verður samantvinnað við útgreiningararbeiðið á demensklinikkini á Landssjúkrahúsinum. Arbeiðið er skipað sum ein verkætlan, og ein verkætlanarleiðari er settur, sum skal samskipa arbeiðið.

## 15. Uppraðfesta ADHD viðgerðartilboðið

Sjúkrahúsverkið skal eftir førimuni menna tilboð í mun til tann tørv, sum er í samfelagnum. Útgreinan og viðgerð til vaksin við ADHD er eitt dømi um lutfalsliga nýtt tilboð, og bíðilistarnir eru drúgvir. Arbeitt verður við at raðfesta ADHD til vaksin, soleiðis at bíðilistar verða styttri, og sjúklingar sleppa skjótari framat til útgreinan. Hetta verður gjørt við at tilluta fleiri resursur til ADHD-økið, so at fleiri útgreiningar verða gjørdar, eitt nú við lækna, sálarfrøðingi og sjúkrarøktarfrøðing.

## 16. Útgangandi funktiónir til sjúklingar

Trýstið á bæði primeru heilsuskipanina og sjúkrahúsini ger, at nógvar akuttar innleggingar eru, sum kundu verið fyribyrgdar, vóru møguleikarnir betri at veita ymsar smærri tænastur úti á staðnum. Ein slík tænasta kann eisini gera tað møguligt at útskriva sjúklingar fyrr.

Tænasturnar mugu skipast í tøttum samstarvi við kommunurnar og Almannaverkið. Dialogur og kunning verður eisini skipað á regluligum dialogfundum við kommunulæknarnar í samstarvi við Heilsutrygd.

## 17. Ætlan fyri telemedisinskar loysnir

Telemedisin kann vera við til at menna viðgerðirnar í Sjúkrahúsverkinum, við tað at møguligt verður at veita viðgerðir úr fjarstøðu við hjálp frá kunningar- og samskiftistøkni. Sjúkrahúsini arbeiða alsamt við at menna telemedisinskar loysnir, men møguleikarnir eru ikki tømdir. Sjúkrahúsverkið hevur eitt nú møguleika at vera við í einum samstarvi, sum Ríkissjúkrahúsið og Bornholm hava gjørt. Eydnast tílíkar telemedisinskar loysnir, so ber eisini til at fáa fatur á serkunnleika, sum vit annars ikki hava í Føroyum, og samstundis brúka hetta til at menna Sjúkrahúsverkið.

## 18. Útbúgving og gransking

Gransking og hartilhoyrandi undirvísing eru grundarsteinurin undir teimum viðgerðum, sum Sjúkrahúsverkið veitir. Gransking og serliga gransking í Føroyum, skapar vitan til frama fyri sjúklingar. Í dag er undirstøðukervið til sjúkrahúsgransking í vánaligum standi. Fyri at menna Sjúkrahúsverkið er alneyðugt at tryggja undirstøðukervið fyri sjúkrahúsgransking: hølir til kliniska gransking; tólbúnað; skrivstovuhølir til granskarar; talgilding av dátum; hølir til simulatiónsvenjingar; hølir til undirvísing o.a. Ein týðandi effekt av einum góðum og stimbrandi undirstøðukervi til gransking er ein munandi betri møguleiki at draga nýggj starvsfólk til.

## Starvsfólkamenning og trivnaður

### 19. Strategi fyri rekruttering og fasthaldan

Sjúkrahúsverkið skal vera eitt arbeiðspláss, har fólk ynskja at fáa arbeiði, og har starvsfólkini trívast og mennast. Tað eru í dag fakøkir, har tað er torført at fáa skikkaði starvsfólk. Tí skal gerast ein yvirskipað rekrutteringsætlan fyri sergreinar, fakøkir og starvsbólkar. Í fyrstu atløgu verður serliga hugt eftir økjum, har tað er trupult at rekruttera. Tað eru fleiri lutir í einari strategi fyri rekruttering og fasthaldan: ein nýggj dimensioneringsætlan skal nýtast sum grundarsteinur undir rekrutteringsarbeiðinum; afturvendandi trivnaðarkanningar skulu virka sum eitt stýringsamboð, tá arbeitt verður við trivnaðinum í Sjúkrahúsverkinum; og rotatión og vitjan millum sjúkrahúsini kann hugsast sum ein partur fyri at røkka málinum um rekruttering og fasthaldan.

### 20. Strategi fyri starvsfólkamenning

Støðug faklig menning av starvsfólkunum í Sjúkrahúsverkinum gevur betri tænastur og hevur við sær betri trivnað. Ætlanin er at gera eina strategi fyri menningina av øllum starvsfólkabólkum í Sjúkrahúsverkinum, sum m.a. ásetur, at tær raðfestingar, ið verða gjørdar, koma øllum Sjúkrahúsverkinum til góðar, og skulu gerast við atliti til strategimálini, sum sett eru fram.

### 21. Trivnaðarkanningar og sálarligt arbeiðsumhvørvi

Fyri at menna eitt gott arbeiðspláss og harvið tryggja eina góða tænastu er neyðugt, at starvsfólk støðast og trívast. Trivnaðarkanningar eru ein ítøkiligur háttur at kortleggja tað sálarliga arbeiðsumhvørvið og trivnaðin millum starvsfólk. Trivnaðarkanningar kunnu harumframt brúkast sum eitt strategiskt amboð til at varðveita og rekruttera starvsfólk, umframt at styrkja Sjúkrahúsverkið sum eitt attraktivt og effektivt arbeiðspláss, har trivnaður er í hásæti.

### 22. Starvsfólkaumbýti – innan- og uttanfyri Sjúkrahúsverkið

Starvsfólkini á teimum trimum sjúkrahúsunum skulu kenna Sjúkrahúsverkið sum eitt arbeiðspláss og síggja starvsfólkini á hinum sjúkrahúsunum sum sínar starvsfelagar. Starvsfólkaumbýti er ein liður í hesum arbeiðinum.

Í Sjúkrahúsverkinum arbeiða fleiri fólk innan sama øki, men á ymiskum støðum. Vit ynskja, at okkara starvsfólk fáa fleiri royndir og størri sjónarring innanfyri sítt fakøki, og tí skulu starvsfólk verða eggjaði til at býta um arbeiðsstað av og á. Tað gevur bæði ein øktan kunnleika, eina góða relatión og betri samstarv millum starvsfelagar í Sjúkrahúsverkinum. Vit skulu eisini bjóða fleiri starvsfólkum uppihald á sjúkrahúsum, sum vit samstarva við uttanlands.

### 23. Mannagongdir, tá starvsfólk byrja í og fara úr starvi

Sjúkrahúsverkið er eitt stórt arbeiðspláss, og hvønn mánað verða nýggj starvsfólk sett. Onboarding er eitt nú at tryggja skipaðar mannagongdir, tá nýggj starvsfólk byrja, so formalia, kunning, menningarætlanir o.l. eru væl skipað, so nýggj starvsfólk kenna seg vælkomnan. Endamálið er, at starvsfólkini kenna sínar uppgávur og kenna hvat verður væntað av teimum, so tey skjótari kunnu koma í gongd við at røkja uppgávurnar væl.

Samstundis sum tað er týdningarmikið at hava góðar setanartilgongdir, hevur tað eisini stórt virði at hava góðar "off-boarding" tilgongdir, t.v.s. at skilja og eftirmeta hví starvsfólk velja at gevast. Eisini er umráðandi at tryggja, at týdningarmikil vitan verður rótfest í organisatiónini, áðrenn starvsfólk gevast í starvi.

### 24. Leiðsla og leiðslumenning

Týdningarmikið er, at allir leiðarar í Sjúkrahúsverkinum halda somu kós – fram ímóti visjóni hjá Sjúkrahúsverkinum.

Neyðugt er at skipa fyri leiðslufakligari menning, bæði í felag og eisini hvør sær. Tað merkir, at ætlanir fyri hvørt leiðslustig eiga at verða gjørdar. Dentur skal leggjast á, hvussu betranararbeiðið er skipað, og hvørji háttaløg verða nýtt í betranararbeiðinum. Visión, missión og virðir eru grundarsteinar undir leiðslumenningini. Eitt av endamálunum við leiðslumenningini í Sjúkrahúsverkinum er, at vit hava eitt felags leiðsukodeks og felags leiðsluatferð og á henda hátt tryggja, at leiðslan gongur á odda, bæði hvat viðvíkir mentan og atburði.

## KT, medico og heilsuskipanir

### 25. Talgildu Føroyar

Politiskt er avgerð tikin um, at almennu Føroyar skulu mennast í mun til talgildar tænastur. Tænasturnar og tilhoyrandi dáturnar í Sjúkrahúsverkinum eru nógvar, og tískil eru talgildu menningarmøgulleikarnir í Sjúkrahúsverkinum eisini stórir.

Endamálið við at menna talgildar tænastur er at gerast effektivari, so sjúklingurin fær betri, skjótari og bíligari tænastu. Tað skal gerast lættari og minni tíðarkrevjandi at avgreiða síni viðurskifti við Sjúkrahúsverkið, og tað skal gerast lættari hjá Sjúkrahúsverkinum at hugsavna seg um kjarnutænasturnar.

Ein langtíðarætlan skal gerast fyri raðfesting í mun til tænastur í Vanganum. Allar tænastur kunnu ikki talgildast samstundis, men mugu mennast so hvørt, tí er eisini neyðugt við fleiri deilmálum. Talgildar tænastur, sum Sjúkrahúsverkið kann veita borgarum, kundu eitt nú verið ein talgildur kalendari í Vanganum, við møguleika at góðkenna innkallingar, bíleggja tíð ella broyta ambulantar tíðir.

### 26. Heilsunet í øllum Sjúkrahúsverkinum

Neyvt samstarv um KT er ein fortreyt fyri effektivum og smidligum samstarvi í Sjúkrahúsverkinum. Avgerð er tikin um, at øll sjúkrahúsini skulu yvir á Heilsunetið, og hetta er nú gjøgnumført. At øll starvsfólkini nú virka á sama neti merkir yvirskipað, at øll eru á sama stigi tøkniliga og í mun til trygd og dygd. Heilsunet er infrakervið undir einari røð av KT-skipanum, og tøkniliga leggur hetta lunnar undir størri samstarv, tá ið nýggjar KT-loysnir skulu finnast, sum kunnu virka tvørturum sjúkrahúsini.

### 27. Dygdarskipan og sporing av sterilum amboðum

Fyri at tryggja dygdina av amboðum, og at tað til eina og hvørja tíð ber til at spora aftur, hvørji amboð hava verið nýtt til t.d. hvørja operatión, skal Sjúkrahúsverkið hava eina dygdarskipan, har øll steril amboð kunnu sporast. Arbeiðið við at skráseta sterilu amboðini er byrjað. Ein ætlan skal gerast fyri alt Sjúkrahúsverkið.

### 28. Bíðilistar og hagtøl

Bíðilistar og bíðitíðir til ymsu serlæknaøkini eiga at vera almennir og lætt atkomuligir fyri fólk. Slíkar uppgerðir eru eisini týðandi stýringsamboð hjá leiðsluni at raðfesta eftir. Tað er umráðandi at fáa grundleggjandi skrásetingina eins í øllum Sjúkrahúsverkinum, so til ber at samanbera virksemi og finna fram til bíðilistar og bíðitíðir. Ætlanin er, at bíðilistar og onnur hagtøl verða at finna á heimasíðu Sjúkrahúsverksins.

### 29. Uppstiging COSMIC 8.1.

Føroyska talgilda heilsuskipanin, Cosmic, sum er bindiliður í øllum heilsuverkinum, stendur á einum markamóti og skal dagførast. Dagføringin av Cosmic er týdningarmikil fyri leypandi at betra um, hvussu klinikarar brúka skipanina, og fyri at menna eitt medisinmodul, so samstarvið millum eldraøkið, Gigni, Apoteksverkið og Sjúkrahúsverkið verður optimalt.

### 30. Nýggj talgild heilsuskipan

Svenska fyritøkan Cambio, sum hevur ment og rikið talgildu heilsuskipanina, hevur sagt sáttmálan upp og tí verður neyðugt at finna eina nýggja heilsuskipan til sjúkrahúsverkið.

Sáttmálin er uppsagdur til desember 2023, men Sjúkrahúsverkið fer at leingja sáttmálan soleiðis, at vit kunnu brúka verandi heilsuskipan til ein nýggj kemur ístaðin. Sjúkrahúsverkið metir, at tað kunnu ganga minst fýra ár til ein slík er sett í verk, t.v.s. neyvan fyrr enn í 2025.

Tað er ein umfatandi uppgáva at fáa nýggja skipan til vega. Sjúkrahúsverkið fær óivað ein stóran leiklut í hesari verkætlan, men tað er Heilsumálaráðið, sum skal taka støðu til hvussu arbeiðið at fáa nýggja talgilda heilsuskipan til vega, verður skipað.

### 31. Pre-hospital journalskipan

Í akuttum støðum er tíðin ofta avgerðandi. Í dag síggja læknar ikki dátur um sjúklingin, fyrr enn sjúkrabilurin kemur við sjúklinginum á sjúkrahúsið. Tøkniliga er tað møguligt at tryggja tíðarsannar sjúklingadátur frá sjúkrabilunum inn á sjúkrahúsini.

Ein pre-hospital skipan skal fáa tíðarsannar dátur til móttakandi lækna, meðan sjúklingurin er á veg inn á sjúkrahúsið. Hetta betrar um sjúklingatrygdina. Tað er týdningarmikið einans at implementera skipanir, sum ikki seinka tíðina, sum tað tekur at fáa sjúklingin inn á eitt sjúkrahús, og ikki innføra tíðarkrevjandi registrering av dátum.

### 32. Tryggja sjúklingadátur til uttanhýsis viðgerðarstovnar

Sjúkrahúsverkið hevur fleiri avtalur við viðgerðarstovnar uttanlands. Ov ofta kemur tað fyri, at sjúklingar, sum skulu uttanlands, og teirra dátur ikki fylgjast at, talan er eitt nú um skanningar og blóðroyndir. Avleiðingarnar av hesum kunnu vera, at sjúklingurin noyðist at endurtaka skanningar, blóðroyndir o.l., sum sjúklingurin

longur hevur tikið í Føroyum. Hetta er seinkandi fyri sjúklingagongdina, óhøgligt fyri sjúklingin og kostnaðarmikið fyri Sjúkrahúsverkið.

Tað er alneyðugt at tryggja, at sjúklingadáturnar fylgja sjúklinginum. Fyri at tryggja hetta, er tørvur á at samankoyra P-tal og CPR-nummar, fyrst og fremst fyri at fáa tryggar sjúklingagongdir, harnæst fyri lættari at fáa atgongd til tøkar journalupplýsingar millum Føroyar og Danmark.

### 33. Sjúklinga app

Sjúklingurin eigur sínar egnu sjúklingadátur og skal hava lætta atgongd til dáturnar. Møguleikarnir við einari sjúklinga-app eru stórir, og verður hetta eitt stórt framstig í mun til at betra tænastuna til sjúklingarnar.

Sjúkrahúsverkið vil menna eina sjúklinga-app, har tað eitt nú er møguligt at síggja egnan journal, fáa innkallingar og síggja royndarúrslit. Hetta kann møguliga gerast í samstarvi við Talgildu Føroyar.

## Strategisk menning

### 34. Heildarætlan og støðulýsing av øllum bygningunum hjá Sjúkrahúsverkinum

Søguliga hevur tað verið trupult at viðlíkahalda bygningarnar í Sjúkrahúsverkinum, og hóast tað er stórur munur á aldri og støði á ymisku bygningunum, er tað generella støðið vánaligt. Fyri at tryggja at bygningarnir eru í einum standi, sum svarar til teirra nýtslu, eru Sjúkrahúsverkið og Landsverk farin saman um at gera eina heildarætlan fyri allar bygningarnar í Sjúkrahúsverkinum. Í alt hevur Sjúkrahúsverkið 80.434 $m^2$, ið er uml. 33% av samlaðu ognunum hjá Føroya Landsstýri.

Landsverk ger eina fakliga meting av, hvørjum standi bygningarnir eru í, og Landsverk er biðið um at gera eina heildarætlan. Við heildarætlanini kann viðlíkahaldsarbeiðið skipast og raðfestast á skynsamasta hátt, soleiðis at játtaði peningurin til endamálið verður nýttur skilabest.

### 35. Nýggjan fyrisitingarbygning á Klaksvíkar Sjúkrahúsi

Sjúkrahúsverkið skal hava nútímans karmar fyri at veita sjúklingunum eina tænastu á altjóða stigi. Gamla læknahúsið, ið stendur á sjúkrahúsøkinum í Klaksvík, skal dagførast til fyrisitingarbygning, so meira pláss verður fyri kliniskum virksemi í núverandi fyrisitingarbygningi.

### 36. H-bygningurin tikin í nýtslu

Sjúkrahúsverkið flytur inn í eina nýggja øld við H-bygninginum. H-bygningurin er stórur, og sjálv verkætlanin sjáldsama kompleks. Hetta setur stór krøv til eina skipaða tilgongd í sambandi við flytingina. Ein ætlan skal gerast fyri, hvør flytur nær, hvussu flutt verður, og hvørji atlit skulu takast, áðrenn og meðan flutt verður.

H-bygningurin gevur kærkomnar fermetrar til Sjúkrahúsverkið, men sjálvt við H-bygninginum, so er væntandi, at tað eisini í framtíðini verður trongligt. Fyri at tryggja, at øll hølini verða brúkt optimalt, og at sjúklingagongdirnar verða so munagóðar sum gjørligt, skal eisini ein neyv ætlan leggjast fyri, hvussu hølini skulu nýtast í framtíðini. Ein verkætlanarleiðari og eitt verkætlanarfólk eru sett burturav at skipa arbeiðið. Saman við avvarðandi leiðslum og starvsfólkum skulu tey fyriskipa sjálva flytingina av starvsfólkum, tólum og sjúklingum.

### 37. Dagføra akuttilbúgvingarnar

Sjúkrahúsverkið eigur áhaldandi at dagføra akutttilbúgvingar, bæði fyri fakliga at lúka neyðug krøv og fyri at sjúklingar altíð fáa dygdargóða og trygga akuttviðgerð.

Millum málini er at fáa eina skipaða neyðtøkutilbúgving, soleiðis at ikki longur verður neyðugt at fráboða tilburðin til løgregluna, fyri at fáa neyðugar kanningar framdar í sambandi við neyðtøku ella neyðtøkuroyndir.

Somuleiðis eigur Læknavaktin at verða styrkt, so at Læknavaktin eisini kann veita hjálp, tá sálarligar bráðstøður taka seg upp. Uppskot um hvussu hetta kann skipast er gjørt.

### 38. Dagføra Sjúkraflutningstænastuna

Sjúkraflutningstænastan er ein høvuðsæðr í tilbúgvingini í øllum Sjúkrahúsverkinum. Stórar broytingar eru farnar fram í samfelagnum seinnu árini. Stóru íløgurnar í infrakervið og bøtta samferðslan skapa nýggjar møguleikar og seta nýggj krøv. Neyðugt er at endurskoða sjúkraflutningstænastuna, so at øll starvsfólk í sjúkraflutningstænastuni arbeiða eftir somu mannagongdum og við somu útgerð – har tað er møguligt – og fyri at fakkunnleikin í Sjúkrahúsverkinum verður nýttur optimalt.

### 39. Strategisk dimensioneringsætlan

Sjúkrahúsverkið strembar eftir, at so nógvar kanningar og viðgerðir á so nógvum serlæknaøkjum sum gjørlig verða bjóðaðar í Føroyum. Dimensionering er at áseta støðd og býti av ymsu sergreinunum í Sjúkrahúsverkinum.



Afturat dimensioneringini eigur støða at takast til, hvørji serøkir ikki skulu staðsetast í Sjúkrahúsverkinum men viðgerast uttanlands.

Dimensioneringin skal bæði áseta støðd og býti av ymsu sergreinunum og vísa á, hvussu sergreinarnar ella serøkini skulu mannast. Neyðugt er at fáa staðfest dimensioneringsætlanina bæði fakliga og politiskt. Frymilin fer at leggja seg tætt upp at metingini hjá danska Heilsustýrinum. Staðfesta dimensioneringsætlanin eigur at verða nýtt sum grundarlag fyri, hvussu og hvar Sjúkrahúsverkið raðfestir í sambandi við rekrutteringsstrategi. Í tilgongdini eigur uppgávuflyting at umhugsast, har ressursurnar verða gagnnýttar á bestan hátt við røttu fakligu førleikum.

### 40. Ætlan fyri kliniska staðseting í Sjúkrahúsverkinum

Í tí sameinda Sjúkrahúsverkinum skulu ongar óneyðugar dupultfunktiónir vera. Akuttvirksemi skal í mest møguligan mun skipast á Landssjúkrahúsinum, ímeðan elektivt virksemi skal skipast í øllum Sjúkrahúsverkinum.

Yvirskipað støða skal takast til, hvørjar sergreinar skulu vera hvar, og dentur eigur at verða lagdur á at samskipa virksemið innan ymsu sergreinarnar tvørturum sjúkrahúsini.

### 41. Familjudepilin

Endamálið við nýggja Familjudeplinum er at stuðla undir alla tilgongdina hjá barnafamiljum, børnum og ungum, frá gitnaði til barnið er 18 ár. Allar barnakonur, børn og ung fáa á hendan hátt viðgerð á sama depli. Nýggi depilin er ein samanrenning av føðideildini, barnadeildini og barna- og ungdómspsykiatriini.

Við Familjudeplinum verður skapt eitt umhvørvi, har dentur verður lagdur á tvørfakliga fyribyrging, stuðul, kanning, viðgerð, uppfylging og trivnað fyri øll børn, uttan mun til um tey stríðast við somatiska ella psykiatriska sjúku, avvarðandi teirra, umframt komandi foreldur og allar nýføðingar í Føroyum. Familjudepilin er ein størri organisatorisk broyting, og tað eru nógv serøkir, ið ikki vanliga hava arbeitt saman, ið nú verða skipað á einum og sama depli. Familjudepilin var formliga settur í verk 1. juni 2021, og er arbeiðið at menna depilin sett í verk.

### 42. Steno Diabetes Center Færøerne

Í Sjúkrahúsverkinum vilja vit hava heilsutænastur á hægsta stigi. Heilsumálaráðið og Novo Nordisk Grunnurin eru farin undir eitt samstarv um at skipa eina diabetesmiðstøð í Føroyum, og báðir partar hava góðkent eitt visjónsupprit, sum er grundarsteinurin undir einum góðum samstarvi millum partarnar. Tað yvirskipaða málið við samstarvinum er at leingja um livialdurin og betra um lívsgóðskuna hjá fólki við diabetes og øðrum endokrinologiskum sjúkum. Komandi diabetesmiðstøðin verður sett á stovn á Landssjúkrahúsinum.

Næsta stig í samstarvinum er at skriva eina “drejebog”, sum nágreiniliga skal forklára, hvussu visjónin kann røkkast. Málsetningurin er at skriva “drejebogen” í 2022, og at Steno Diabetes Center Færøerne verður virkið primo 2023.

### 43. Raðfesta tilmælini í nýggjari Krabbameinsætlan

Skjót og góð krabbameinsviðgerð er avgerandi fyri møguleikarnar hjá tí rakta at koma seg. Heilsumálaráðið hevur sett ein arbeiðsbólk at endurskoða krabbameinsøkið og at gera eitt tilmæli til nýggja krabbameinsætlan. Nýggja krabbameinsætlanin verður handað landsstýrismanninum í 2022. Tá Krabbameinsætlanin er handað fer Sjúkrahúsverkið at viðgera og raðfesta tilmælini saman við politiska myndugleikanum.

# KAPITTUL 5

# Íverksetan og eftirmeting

At seta í verk 43 strategisk mál næstu fýra árini er umfatandi og krevjandi uppgáva. Skal Sjúkrahúsverkið eydnast við tí, er neyðugt at hava eina holla og vælskipaða ætlan fyri íverksetanina. Somuleiðis er týdningarmikið, at neyvar greiningar verða gjørdar, og at orka verður sett av til íverksetanina, so at arbeiðið gevur ta effekt, sum leiðslan ynskir. Fyri at tryggja framdrift í íverksetanini av strategisku málunum, hava tveir av varastjórunum í Sjúkrahúsverkinum fingið ábyrgdina av øllum íverksetanararbeiðinum. Arbeiðið kann býtast upp í tveir høvuðsbólkar: tann vertikala og tann horisontala íverksetanin.

Tann vertikala íverksetanin er frá leiðsluni í Sjúkrahúsverkinum til depilsleiðslu, víðari til deildarleiðslu og yvirlæknar, fyri síðani at fara til øll starvsfólkini í Sjúkrahúsverkinum. Tann horisontala íverksetanin gongur fyri seg ímillum sjúkrahús og millum deplar og deildir. Í slíkum arbeiði er týðandi, at øll strategisku málini og uppgávurnar verða væl rótfestar í leiðslunum og millum starvsfólkini í Sjúkrahúsverkinum.

## Leypandi eftirmeting

Meðan ein missión, visjón og virðir kunnu og eisini eiga at verða statisk yvir longri tíð, so skal ein strategi leypandi eftermetast og til tíðir dagførast, sum frá líður. Leiðslan í Sjúkrahúsverkinum fer at fylgja leypandi upp uppá tey strategisku málini. Árliga verður sjálv strategiin eftirmett, og støða skal takast til, um nøkur broyting skal gerast, eitt nú at broyta í raðfestingum av málum, dagføra tíðarætlan o.l. Verður strategiin broytt í týðandi mun, verður hetta gjørt í tøttum samstarvi við Heilsumálaráðið.

## Sjúkrahúsleiðslan skal bera strategiina á mál

Sum hetta ritið vísir, so skal nógv arbeiði til, fyri at røkka visjónini fyri 2025 og teimum 43 strategisku málunum, sum sett eru fram. Talan verður um leiðslur og starvsfólk á ymsum stigi og á øllum sjúkrahúsunum. Men tað er fyrst og fremst leiðslan í Sjúkrahúsverkinum, sum skal ganga á odda fyri at bera strategiina á mál. Tað gleða vit okkum til.

**Dato:** 27/10-21

**Steinar Eirikstoft**
forstjóri

**Alexandra á Dul**
stjóri

**Hans Pauli Henryson**
stjóri

**Súsanna Olsen**
varastjóri

**Margit Stórá**
varastjóri

**Gunnbjørg Guttesen**
varastjóri

**Tummas í Garði**
varastjóri

**Landssjúkrahúsið**
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo

**Suðuroyar sjúkrahús**
Sjúkrahúsbrekkan 19
FO-800 Tvøroyri

Tel. +298 34 33 00
ssh@ssh.fo

**Klaksvíkar sjúkrahús**
Sjúkrahúsbrekka 1
FO-700 Klaksvík

Tel. +298 45 45 45
ks@ks.fo

**sjukrahusverk.fo**